


# Thor Modi - enn ein stoltleiki í føroyska frálandsflotanum

**Jan Müller**

14.05.2015 - 11:31

Oljan.fo

Kl. 11 í morgun varð M/V Thor Modi handaður Thor reiðarínum á Besiktas skipasmiðjuni í Turkalandi. Eitt hátíðarhald við umboðum fyri reiðaríið og innbodnum varð hildið, har alt gekk uppá stás.

Fyrsta av teimum fýra nýggju skipunum, M/V Thor Modi, bleiv sjósettur 15. desember og hevur arbeiðið gingið heilt væl. M/V Thor Modi er næstur í røðini av fýra nýbygningum hjá felagnum, sum eru serútgjørdir til fleirtáttaðar tænastur fyri seismikskip. Skipini verða øll flokkað í hægsta umhvørvis- og ísklassa, nevnt Clean Design, Recyclable og Ice-1A og verða 64,4 metrar til longdar og 2015 BT til støddar.

Nýbygningarnir hjá Thor seta felagið í ein klassa fyri seg innan seismikk support vinnuna í øllum heiminum og ruddar slóð fyri nýggjum tænastumøguleikum hjá felagnum.

Thor hevur langtíðar sáttmálar við PGS og fer Thor Modi beint í arbeiði í komandi viku. Triðja skipið verður latið eigarunum í summar og tað seinasta seinni í ár.